# inni - trygt og ómaksleyst til hús



## Grundstykki – á Ryggi 35, Nólsoy

Grundstykkið matr.nr. 88b á 458 m$^2$ liggur sera væl fyri í norðara endanum í bygdini við asfalteraðan blindan veg í barnavinaligum, friðaligum og náttúruvøkrum umhvørvi við góðum útsýni. Lætt er at binda í el, vatn og kloakk.



## Tvíhús – Gerðisgøta 9, Lamba

Húsini verða eftir ætlan liðug á heysti 2008. Húsini verða í 2 hæddum – samlað búvídd 200 fermtrar. Húsini koma at hava føroyaprofil klædning svart alu-tak, tætt tróður við dúki, plastikk vindeygu og úthurðar. Innhurðarnar verða fyllingshurðar (Finland), og gólvini á vesinum verða sveisivenyl. Í ovaru hæddini verður durur, gongd, baðirúm og 2 kømur, hjúnarrúm, goymslurúm, køkur/stova og svali. Møguleiki verður at velja gólv og køk eftir egnum ynski. Niðara hæddin verður óinrættað. Tapetsering og máling eru ikki íroknað prísin, men møguleiki er fyri at fáa hetta gjørt.

**Prísur : 1.250.000,00**



## Handils – og skrivstovubygningur: Jónas Broncksgøta 40, Tórshavn

Bygningurin er í 3 hæddum, veg- og miðhædd eru hvør uml. 80 m$^2$ og ovasta hædd uml. 10 m$^2$ – í alt uml. 170 m$^2$. Grundøkið er 179 m$^2$. Byggiárið er upprunaliga 1950, men húsini eru høvuðsumvæld við bjálving, klædningi, vindeygum, hurðum, gólvum o.ø. Í niðastu hædd er inngongd, handilshøli, skrivstovuhøli, goymsla, fýrrúm og baðirúm. Í ovaru hædd er inngongd, gongd við trappu til loftið, 2 stovur / skrivstovur, køkur, baðirúm, 2 kømur / skrivstovur. Í ovastu hædd er kamar og loftsrúm / goymslurúm, sum til ber at innrætta til íbúð. Sunnanfyri er garður við inngongd til íbúðina. Bygningurin stendur við virkna handils- / høvuðsgøtu nær miðbýnum í Havn og kann nýtast til handil og umsiting eins og til bústað.

**Prísuppskot : 2.300.000,00**



## Sethús – Birnugøta 29, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum – ovara hædd er uml 60 m$^2$ og niðara hæddin 101 m$^2$ – í alt uml. 161 m$^2$, Til hoyrir eisini ein garaga við lítlum loftið ið er umleið 24 m$^2$, parkeringsøkið er til tveir bilar. Eisini er steinsettur krúpikjallari. Grundøkið er 602 m$^2$. Byggár: 1978. Í miðhæddini er durur, hjallur, gongd, trappuuppgongd, baðirúm, køkur/stova við útgongd til terassu , kamar og kjallararúm/fýrrúm. Í ovastu hæddini er baðirúm við brúsu og baðikari, hjúnarúm við útgongd til altan, 2 kømur, klædnarúm, goymslurúm og útiloft við stovu. Stórsligin urtagarður er runt húsini og terassa er suðureftir og vestureftir. Húsini standa sera væl fyri við blindan veg, friða økið er eystanfyri húsini, har er gott busssamband, veðurgott, barnavinaligt og panorama útsyni. Húsini standa tætt við miðbýin og tó kennur tú tað sum tú ert úti á bygd.

**Prísuppskot : 2.700.000**



## Sethús – Oyrabakkavegur 41, Oyrabakki

Hugnaligu húsini eru í 3 hæddum. Ovasta hæddin er umleið 45 m$^2$ - Miðhæddin er umleið 65 m$^2$ - Kjallarin er umleið 45 m$^2$. Íalt umleið 155 m2. Grundøkið er 1960 m$^2$. Byggiár 1953. Til húsini hoyrir eisini eitt úthús/garaga. Í ovastu hæddini eru 2 kømur og hjúnarúm. Í miðhæddini er durur, hjallur, gongd, baðirúm, køkur og stova. Í niðastu hæddini er kjallararúm/fýrrúm. Tað er urtagarður rundan um húsini, ið standa væl fyri og hava sera gott útsýnið. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.

Prísuppskot : hóskandi boð



## Sethús – Argjavegur 41b, Argir

Húsini eru í 3 hæddum, miðhædd og kjallari 67 m$^2$ hvør, umframt óinnrættað loft uml. 35 m$^2$. Grundøkið er 543 m$^2$. Byggiár 1964. Í miðhæddini eru nýmótans køkur, stova, 2 kømur, baðirúm, gongd, hjallur og vindfang. Í kjallarahæddini er sjálvstøðug íbúð við køki, stovu, kamari, baðirúmi og gongd, umframt kjallara-/fýrrúm. Loft sum er óinnrættað kann innrættast. Húsini eru í góðum standi, standa í friðarligum, barnavinarligum og veðurgóðum umhvørvi, og hava rímiligt útsýni.

**Prísuppskot : 2.000.000**



## Sethús – Eystari Ringvegur 3, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum – ovara hædd er 124 m$^2$ og niðara 73 – í alt uml. 197 m2. Grundøkið er 889 m2. Byggár: 1966. Í erva er inngongd, durur, hall, baðirúm, køkur, borðstova, stova, bryggers / vaskirúm / fýrrúm við egnari útgongd, hjallur, millumgongd og 3 kømur. Í neðra er inngongd, gongd, 3 goymslu- og kjallararúm, ið lættliga kunnu innrættast til íbúð. Garður / urtagarður er runt húsini og 4 – 6 bilar kunnu standa í túninum. Húsini standa nær býnum í sera náttúruvøkrum umráði út til friðað øki, og har er gott busssamband, veðurgott, barnavinaligt og gott útsýni.

**Prísuppskot : 2.300.000,00**



## Sethús – Høganesvegur 23, Toftir

Húsini eru í 3 hæddum – ovasta hædd er 54 m2 - miðhæddin 54 m2 og kjallarin 54 m2 íalt uml. 162 m2. Til húsini hoyrur eisini eitt stórt úthús. Grundøkið er 890 m2. Byggár: 1924. Í miðhæddini er durur, gongd stova, køkur, trappuuppgongd og trappuniðurgongd. Í ovastu hædd er baðirúm, hjúnarrúm og 3 kømur. Í kjallarinum er fýrrúm/ vaskirúm og kjallararúm. Urtagarður og terassa er niðan fyri húsini.Øll miðhæddin er renuerað og nýtt baðirúm er á loftinum. Húsini hava nyggjan klædning og nýggj vindeygu. Húsini standa væl fyri, og har er gott busssamband, veðurgott, barnavinaligt og gott útsýni.

Um hóskandi boð fæst.



## Tvíhús – Hornavegur 5b, Oyri

Nýggju tvíhúsini eru í 3 hæddum, miðhæddin og ovasta hæddin eru til sølu. Miðhæddin er 68 m$^2$ og ovasta hæddin er 58 m$^2$ - í alt 126 m$^2$ – alt er innrættað. Grundøkið er 300 m$^2$. Byggiár: 2007. Húsini hava føroyaprofilklædning, svart alminiumstak, tætt tróður við dúki, plastikvindeygu og úthurðar og innhurðarnar eru fyllingshurðar ( Finland), og gólvini á vesinum er sveisað vinyl. Í miðhæddini er durur, gongd, trappuuppgongd, baðirúm við brúsu, køkur/stova í einum og vásakøkur. Í ovastu hædd er, hjúnarúm, 2 kømur og wc. Húsini eru orkusparandi, liggja í barnavinarliigum og friðaligum umhvørvi, hava gott útsýni og góð parkeringsviðurskifti.

**Prísur : 950.000,00**



## Tvíhús : Lynggøta 5, Norðskáli

Í mai mánaði 2008 varð farið undir at byggja eini tvíhús á Lynggøtu við Norðskála, sum verða liðug í septembur mánaði 2008. Húsini verða í 1 hædd - samlað búvídd 95 fermetrar. Eisini er eitt ovasta loft íð kann innrættast Húsini koma at hava føroyaprofil klædning svart alminiumstak, tætt tróður við dúki, plastikk vindeygu og úthurðar. Innhurðarnar verða fyllingshurðar ( Finland), og gólvini á vesinum verða sveisivenyl. Tey eru innrættaði soleiðis : Durur, gongd, baðirúm, forstova , 2 kømur, hjúnarrúm, grovkøkur, køkur,og stova. Møguleiki er at velja gólv og køk eftir egnum ynski. Eisini kemur eitt goymslurúm at hoyra til húsini.

**Prísur: kr. 1.150.000,00.**



## Sethús – á Stórheyggi 1, Velbastaður

Húsini eru í 1 hædd á 138 m2 og við lágum hjallara. Grundøkið er 974 m2. Byggiárið er 1986, men húsini eru dagførd og í góðum standi. Dururin er gjørdur av nýggjum, gólv eru skift í gongd og kømurum, innhurðar eru skiftar og alt er málað. Har er inngongd, durur, hjallur (bryggers), gongd / hall, hjúnarrúm, baðirúm, 3 kømur, matarkøkur og borðsstova / stova við útgongd til útigólv. Í neðra er fýrrúm / vaskirúm / kjallararúm. Húsini standa í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og skúlar, dagstovnur og skúlabussur er nær við. Útsýnið er heilt einastandandi vakurt.

**Prísuppskot: kr. 1.950.000,00.**



## Sethús – Landavegur 8 , Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum – tær niðastu eru 42 m$^2$ og ovasta er 35 m$^2$. Har til er hjallur / goymslurúm á 25 m$^2$ – í alt 144 m$^2$. Grundøkið er 282 m$^2$. Byggiárið er 1881, men húsini eru umvæld og dagførd so við og við. M.a. eru nýgg gólv, nýggjur køkur og alt loftið er gjørt av nýggjum. Í miðhæddini er stórur hjallur / úthús, inngongd, gongd, baðirúm, køkur / alrúm, borðsstova / stova. Í erva er trappuuppgongd / trappupallur og 2 kømur. Í neðra er vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm. Garður og stórt parkeringsøki er aftanfyri húsini. Húsini standa sera væl fyri mitt í býnum í hugnmaligum, friðarligum og veðurgóðum umhvørvi nær Skálatrøð og hava frálíkt útsýni av loftinum.



## Sethús – Mannbrekka 8, Hoyvík

Stóru húsini eru í 3 hæddum á 109 m$^2$ – í alt 327 m$^2$ og hartil er bilhús á 20 m$^2$. Grundøkið er 1012 m$^2$. Byggiárið er 1976, men ymiskar dagføringar eru gjørdar so sum nýgg vindeygu á lofti omaneftir, altanhurð. Í miðhæddini er inngongd, durur, hall/trappugongd, gesta-wc, hjúnarrúm við skábsveggi og egnum baðirúmi, køkur, stova/arbeiðsrúm og borðsstova við útgongd til útigólv/altan. Í ovastu hædd er trappugongd, gongd, baðirúm, stova, 3 kømur og goymslurúm. Í niðastu hædd er inngongd, gongd, stova/ítrivsrúm, baðirúm/wc/sauna, fýrrúm, stórt vaskirúm við útgongd til urtagarð og hjall, og goymslurúm. Húsini standa í veðurgóðum, friðarligum og vøkrum umhvørvi. Dagstovnar, skúli, studentaskúli og stórur handil er nær við og úr húsunum er panoramaútsýni yvir Havnina, Nólsoynna og út á fjørðin.

**Prísuppskot: kr. 3.500.000,00.**



## Sethús – Viðargøta 25, Argir

Nýggju, frálíka snøggu og stásiligu sethúsini eru í 2 hæddum á 138 m$^2$ – í alt 276 m$^2$ – alt innrættað. Grundøkið er 500 m2. Byggiár: 2007. Einki er spart, tá ið talan er um tilfar og dygd. Í erva er inngongd, gongd / hall / trappugongd, baðirúm, arbeiðsrúm / kamar við klædnarúmi, stova við brenniovni, borðsstova / alrúm / køkur, hjallur, grovkøkur / vaskirúm við útgongd til garagu við inngongd og sjálvvirkandi portri. Í neðra er inngongd, gongd / trappugongd, stova / alrúm – har klárt er at seta upp køk, hjúnarrúm, baðirúm, kamar við klædnarúmi, goymslurúm / teknikkrúm, vaskirúm, fýrrúm / kjallararúm. Altanur og garður / urtagarður er ávegis. Húsini standa í náttúruvøkrum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Skúli, barnagarður og busssamband er nær við, og nýggjur skúli og ringvegur er á veg. Framúrskarandi panoramaútsýni er inn yvir Havnina og út á fjørðin.

Um hóskandi boð fæst



## Sethús Sjúkrahúsbrekka 12 Tvøroyri

Húsini eru í 3 hæddum á 68,5x3+5 = 210 m$^2$. Grundøkið er 230 m$^2$. Húsini eru upprunaliga bygd uml. 1910, men eru bygd heilt av nýggjum í 2007. Í miðhæddini er inngongd, durur / gongd, gestawc, køkur / alrúm / borðsstova / stova og bryggers við egnari inngongd. Í ovastu hædd er trappuuppgongd og -pallur, 3 stór kømur og baðirúm. Í niðastu hædd eru 2 inngongdir og 2 kjallararúm. Húsini standa í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi í miðbýnum á Tvøroyri, har stutt er til skúlar, handlar, busssamband o.a. Útsýnið er gott – serliga av loftinum.

**Prísuppskot: kr. 1.000.000,00.**



## Sethús – Norðuri í Sundum 18, Kollafjørður

Hugnaligu húsini eru i tveimum hæddum, 56 fermetrar hvør hæddin, samlað búvídd 112 fermetrar. Grundøkið er 350 m$^2$. Byggiár : 1946. Urtagarður er rundan um húsini. Veghæddin: gongd, baðirúm, hjúnarúm, køkur, stova og trappa til niðastu hædd. Niðasta hæddin, Gongd, fýrrúm, kjallararúm, 2 kømur, baðirúm og stova.. Húsini í góðum standi og eru dagførd øll sum tey eru. Húsini liggja væl fyri, hava gott útsyni og tætt er til allar hentleikar.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Sosialurin